Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Teknsmálstulking av tíðindasendingum

Spurningar:

1. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri at tryggja, at allar Dag og Viku sendingar verða tulkaðar beinleiðis?
2. Nær kann roknast við, at allar sendingar fara at verða tulkaðar beinleiðis?

Viðmerkingar:
Gjørt hevur verið vart við, at ikki allar Dag og Viku sendingar í sjónvarpinum verða tulkaðar beinleiðis í løtuni.
Sum skilst, so eru summar Dag og Viku sendingar nakrar dagar gamlar, áðrenn tær verða tulkaðar av teknsmálstulki.
Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum verður fyrispurningur settur um hetta.

Á Løgtingi, 8. november 2021

Beinta Løwe Jacobsen